gult cyan magenta svart



**SJÓNLEIKUR – Frálíkar týpur í undirhaldandi, syrgiligum og beinraknum leiki um nøkur fólk, sum hava ilt í sálini. Men politiski boðskapurin er dekan ov torskildur, sigur Høgni Djurhuus í hesum ummæli av sjónleikinum »Eitur nakað land Week-end?«**

# Eksorsisma í Sirkus Psycho




*Høgni Djurhuus um tey fimm á stongdu deildini í leikinum »Eitur nakað land Week-end?«: Tey spæla fram úr væl og sannførandi. Tey gera leikin til meira enn eitt handrit og til nógv meira enn eitt politiskt stríðsrit. Tey geva orðunum so nógv lív, tey eru so nærløgd. Tey eru leikarar og effektir í senn*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

UMMÆLI

*Høgni Djurhuus*

*Leikhúsið Gríma:*
EITUR NAKAÐ LAND WEEK-END?
Eftir Jóanes Nielsen.
*Leikstjórn og pallmynd:*
Eyðun Johannessen.
*Leikarar:*
Katarina Nolsøe, Kári Øster, Hans Tórgarð, Birita Mohr, Egi Dam, Kristina Hansen, Høgni Johansen og Símun Pauli Hansen.

Ein hin mest útarmaða orðingin, klisjein, um tey sálarsjúku er spurningurin upp í saman: hvør er normalur? Tey, sum eru hinu megin rimahurðina? Ella tey, sum eru hesu megin rimahurðina? Tíbetur spyr Jóanes Nielsen ikki – ikki so tað bilar, ið hvussu so er – í leikinum hjá sær »Eitur nakað land Week-end?«

Søgur, leikir og filmar um lívið á afturlatnum deildum plaga annars at líkjast nógv. Hevur tú lisið eina ella sæð ein, kennir tú nógv aftur í teimum, sum tú síðani lesur ella sær. Loyalitetur og samhugi við teimum sálarsjúku ganga aftur. Og Jóanes Nielsen er einki undantak. Hann er góður við persónarnar hjá sær. Tí eru teir so sterkir, so viðkomandi og so góðir. So sannførandi og ektaðir.

»Eitur nakað land Week-end?« er um fólkini á einari afturlatnari deild. Nakrar lagnur, sum lagnan hevur hundsað við og argað meira enn gott er. Tey eru bognað. Nøkur meira enn hini. Men innan fyri rimarnar eru tey heil. Og ikki bara av heilivági.

Leikurin er stuttligur upp á tann svarta mátan. Tann svartasta. Hann er eisini so hvassur, at áskoðarin fær sjálvur ilt í sálina av honum. Tí øll noyðast at viðurkenna, sama um tey tora tað ella ikki, at einki í leikinum er ikki tikið beint úr føroyska veruleikanum. Heldur ikki tað at fara í fjósið ella í seyðahúsið at metta kynsligu svongdina, tá hon krevur sítt.

Leikurin byrjar. Fyrst síggja vit pallin gjøgnum eitt tunt klæði (líkklæði?), og vit hoyra hjúnini Thomsen gjøgnum ein ýlandi tóna. Men so fer klæðið frá, og løtu seinni heldur tónin uppat. Hvør skal siga, nú hava øll minst tvær telefonir. Men fólk fáa ikki samband hvørt við annað fyrr enn »ýlitónin er liðugur«.

Og nú er so antin at blunda, seta tumlarnar í oyruni ella rætt og slætt fara, gerst lúturin ov sterkur. Tí tað gerst hann. Øgiliga sterkur. So sterkur, at hann svíður. Men eg mæli ongum til at blunda, tippa oyruni ella sníkja seg á dyr. »Eitur nakað land Weekl-end?« er ein uppliving, sum skal upplivast allan vegin. Undirhaldandi, provokerandi, áloypandi, fúl og frek. Jóanes Nielsen torir øgiliga væl. Men í veruleikanum vísir hann okkum bara ein beiskan, ósmurdan veruleika, sum vit renna undan.

Men viðhvørt fær høvundurin ikki stýrt sær. Hann ger ov nógv av, oysir úr bukkuni við morreyðum orðum. Provokerar bara fyri at provokera. Bara fyri at vísa, at hann torir. Ov nógv av slíkum, og áskoðarin leiðist. Tað er sum við nógvum monnum í Onglandi. Teir duga tvey orð. Annað orðið er »fucking«. Orðið doyr. Tað missir virði. Kódnar í sær sjálvum.

Men Jóanes Nielsen skrivar sum fólk tosa. Og tað er óført. Soleiðis eigur tað at vera. Fólk siga tveyogfjøruti og ikki fýratitvey sum í umsetta leikinum á sinni. Ein arbeiðsmaður í London segði fýratitvey!? Tað styrkir trúvirðið ikki sørt, tá fólkini á pallinum tosa sama mál sum tey, sum tey spæla. Alt annað er fjas. Realisma fær ikki verið hálv.

So kanst tú spyrja: tosar



nakar eisini so háfloygt og poetiskt, sum tey gera viðhvørt í hesum leikinum? Ella gloymir høvundurin, at hann er yrkjari fyrst og fremst, og ikki leikritahøvundur? Kann vera. Men eg haldi tó, at fólk sum tey í »Eitur nakað land Week-end?« tosa soleiðis, tá tað lagið kemur á tey.

Annað, sum høvundurin hevur fingið væl við í leikin, er sexfikseringin hjá sálarsjúkum. Tann innistongda kynsdriftin hjá teimum innistongdu, sum verður so ógvislig, hvørja ferð, hon brýtur út. Og tað er fitt, tá Jóhanna stingur hornið inn undir kjólan, tá maðurin ringir.

## Ásurin DIA

Tey eru fimm á Deildini, fyrst fýra, so kemur ein afturat. Og so aftur fýra.

Jóhanna (Katarina Nolsøe) er høvuðspersónurin. Hon livir og darrar øll, sum hon er, alla tíðina. Sum ein spent fjøður. Sum ein sjampanjuproppur, sum er á veg úr fløskuni og fer úr henni í heilum.

Mótsetningurin hjá henni er Hervør (Birita Mohr). Í einum landi, har sum religión í øllum møguligum variantum fær fólk at religiøsa seg upp, er sjálvsagt, at fólk gerast óð í høvdinum. Hervør hevur stóran kross hangandi um hálsin. Jesus er, sigur hon, ein fittur maður. Hervør trívist nógv betur í hesum fongslinum enn í hinum, tí religiøra. Hon er frelst med alla. Hon torir at siga fisuslikkari hart fleiri ferðir upp í saman, uttan at rodna.

Tórálvur (Hans Tórgarð) er komin á Deildina fyri well. Hann sleppur ongantíð út aftur haðani fyrr enn hann verður borin út. Hann er tann óstýriligi, tann devulsetti, sum tó alla tíðina veit, hvat hann ger og sigur. Hann verður geldur við heilivági (teirri klisjeini sluppu vit so ikki undan). Eg veit ikki, hvør lóg sigur, at í hvørjum einasta verki um sálarsjúk fólk skal vera hesin persónurin, sum ger uppreistur, vil ikki bindast, og kemur aftur á Deildina sum eitt slevandi hím.

Á jólum kemur Tóta (Kristina Hansen). Tað ger hon á hvørjum jólum. Hon er har enn á páskum. Hon hevur ongan og einki at fara út aftur til. Hon hevur tað betri hasumegin enn hesumegin. Og hon trívist, tí hon er líkasæl. Letur seg ikki ávirka. Men ger ein leik í leikinum fyri at sleppa at stýra eina løtu.

Og so er Dia (Egi Dam). Ein guddommilig týpa. Tann besta í leikinum. Og ikki minst tann rætti leikarin, sum er valdur. Dia er fikspunktið á pallinum. Hann er ásurin á Deildini, sum øll hini mala um. Hansara stuttu, absurdu, men merkiliga gløggu viðmerkingar eru millumyvirskriftirnar í hesum tragikomiska drama.

Øll hesi fimm spæla fram úr væl og sannførandi. Tey gera leikin til meira enn eitt handrit og til nógv meira enn eitt politiskt stríðsrit. Tey geva orðunum so nógv lív, tey eru so nærløgd. Tey eru leikarar og effektir í senn. Tey geva alt, sum tey orka. Leikararnir hava annars ikki nógvar effektir at hjálpa sær. Nakað av væl valdum tónleiki er og so ljós og, ja, eg fari ikki at avdúka, hvussu leikurin endar. Tað riggar væl, tí tú heldur, at tað er okkurt annað, sum rakar pallin. Tí verður tú bilsin, tá ljósið verður tendrað.

Thomsen (Kári Øster), maðurin hjá Jóhonnu, er uttanfyri, bæði so og so. Persónurin fánar burtur, tí hinir persónarnir eru so sterkir. Og Kári kann ikki hava fingið nóg nógva leikstjórn. Hann er ikki ein nóg stórur kontrastur til hini. Her er okkurt mislukkað hjá leikstjóranum, haldi eg.

## Karvaður sundur

»Eitur nakað land Week-end« er ein leikur um sálarsjúk fólk. Hann kann upplivast sum tað, og bara sum tað. Tann upplivingin er nóg góð. Og nóg mikil.

Men leikurin hevur eisini ein politiskan boðskap. Um føroyingar og ruðuleikakenda samleikan hjá teimum. Hvørji eru vit? Ein heil tjóð, ella bara ein hálv? Eg endurgevi eftir minnunum:

Jóhanna: vóru mamma tín og pápi tín systkin?

Tórálvur: Nei, mamma er.........var úr Danmark.

Dia: eg bleiv gagg í Grønlandi.

Segði nakar ríkisfelagsskapur? Nógv annað verður eisini sagt um undirbrotligar føroyingar. Um føroyingar í Føroyum. Og um føroyingar í Danmark. Jóhanna er sjúk, tí dóttir hennara var fyri vanlukku í Danmark. Ja, í Danmark.

Men Jóhanna hevur eisini ein annan stóran trupulleika at dragast við. Jóhanna fær ikki frið fyri einum spøkilsi. Spøkilsið er sjálvur »bóndin«, Jóannes Patursson.

Eingin annar enn Jóanes Nielsen hevði torað at farið soleiðis við »bóndanum«. Blasfemi og ærumeiðing, eru orð, sum fara gjøgnum hugan. Tað virkar bara sum ein máttleys mótvekt í leikinum at endurgeva søguna um tann sjúka »bóndan«, sum ikki vildi hava penisillin, tí hann vildi, at ein sjúk smágenta skuldi hava hendan lívgevandi heilivágin, sum so lítið var til av.

Hvat hevur »bóndin« gjørt til sakar, tá hann skal hava eina sovorðna yvirháling? Tað eru bara knappliga tveir mansaldrar, síðani »bóndin« doyði.

Jóhanna hevur koppað standmyndina av »bóndanum« við Landsbókasavnið, har hon arbeiddi og sá hann hvønn dag. Men hon fær ikki frið fyri honum kortini. Ella kanska nettupp tí.

Í einari senu í »Sirkus Psycho«, sum tey á Deildini framføra á jólum (avgjørt einki krubbuspæl), verður »bóndin« grivin upp, og síðani karvaður sundur við stórum knívi. Júst sum í víðagitnu senuni í filminum »Psycho« hjá Hitchcock, tá kvinnan verður stungin niður í brúsuni. Blóðið slettist á forhangið. Jóhanna høggur og stingur, meðan hon syngur »Eg skar mítt navn....«. Eksorsisma í »Sirkus Psycho«. Og nú fær Jóhanna endiliga frið. Tí nú er »bóndin« eina ferð med alla fyribeindur. Og tó, og tó. Jarðarferðin er eftir, rópar Tóta, tá hini fara at hugsa um annað og fullføra ikki.

Niðurstøðan: ein uppgerð við fortíðina? Vit kunnu ikki liva av tjóðskaparromantikki í allar ævir? Vit noyðast at taka upp annan tátt í frælsisstríðnum? Ella sigur høvundurin, at soleiðis fara tit, ússaliga sambandspakk, við hesum mæta manni í Føroya søgu?

Svarið er, sambært høvundinum sjálvum, tað neyðuga faðirdrápið. Og faðirdrápið er ein góð loysn. Tað loysir bond og bindingar. Jóhanna kemur fyri seg, eftir at hon hevur framt tað súmbolska faðirdrápið. Og ikki bara hon, eisini dóttir hennara. Tú skalt ikki æra faðir tín. Tú skalt drepa hann ella ímynd hansara. Ein undarligur boðskapur. Men málið halgar mátan.

Hetta eru alt gitingar. Satt at siga skilji eg ikki, hvagar Jóanes Nielsen ætlar sær við hesum groteska boðskapi. Kennir hann seg ófrælsan og kúgaðan, hví sigur hann tað so ikki bart út. Vanligi áskoðarin hevur ongan kjans at vita, hvør kjarnin er. Tí svarið er ikki nóg greitt í leikinum. Og tað er ein veikleiki. Tá so rívan verður tikið til, eigur áskoðarin at fáa okkurt meira ítøkiligt at miða seg eftir. Ella er tað júst frælsið at tulka, sum áskoðarin fær? Tí hetta er eisini ein leikur um frælsi, ella vantandi frælsi.

Hitt er so heilt greitt, at ein høvundur, sum torir so væl sum Jóanes Nielsen at gera upp við tað, sum fyri nógv er heilagt, hevur uppiborið at fáa virðisløn. Og tað fekk hann jú fyri »Eitur nakað land Week-end?«

Nevnt hevur verið, at leikurin eisini er ein líðingarsøga. Søgan byrjar stutt fyri jól, og hon endar á páskum. Frá føðing til deyða Jesusar (einki faðirdráp her, ella...?). Vit vita, at leikurin endar á páskum, tí á bakkanum við morgundrekka er ein lítil vasi við einari páskalilju. Snilt. Og Tórálvur verður krossfestur, tá hann verður bundin niður í spennitroyggjuna.

## Skipasmiðjan

Pallurin er gjørdur á skipasmiðjuni í Havn. Sum Torbjørn Jacobsen, mentamálaráðharri (hvørki meira ella minni) sigur í einum greinarstubba í leikskránni, sum Óli Breckmann og teir plagdu at kalla interrós:

»Og tað mesta paradoksið man nú vera, at í hesum stríðsfelti er grógvin upp ein toleransa, sum ger tað møguligt hjá kommunistinum og skipasmiðjustjóranum, tveir av høvuðskombattantunum frá sjeytiárunum, at sita øksl við øksl, nú weekendlandið fer av bakkastokki«

Soleiðis fara tíðin og toleransan við øllum. Nú er 1. mai bara ein dagur sum allir hinir dagarnir. Í ár er hann týsdagur. Og eingin reyður sjónleikur um millum annað kapitalistarnar á skipasmiðjuni verður 1.mai.

Pallurin er sera nýtiligur, hann er kaldur og kliniskur og danska jólapyntið ger ongan mun. Serliga tær seks klivahurðarnar kunnu brúkast, og verða brúktar, til ymisk endamál. Tølini á hurðunum kunnu ivaleyst brúkast til onkra súmbolska tulking. Eg havi so onga. Pallurin er ikki stórur, og leikararnir fylla hann út í hvønn krók.

»Sirkus Psycho« er klimaks í leikinum. Eitt ordans klimaks. Men eg saknaði ein betri enda. Eg saknaði »plottið«. Eftir klimaksið, sum er heilt har uppi sjálvandi, fer leikurin niður aftur. Tað er náttúrligt. Men hann fer ov langt niður, og fánar líkasum burtur. Gamaní á ein visuellan flottan hátt og við einari poesi so yndisligari og hjartanemandi, men.....

*»Eitur nakað land Week-end?« er um fólkini á einari afturlatnari deild. Nakrar lagnur, sum lagnan hevur hundsað við og argað meira enn gott er. Tey eru bognað. Nøkur meira enn hini. Men innan fyri rimarnar eru tey heil. Og ikki bara av heilivági, sigur Høgni Djurhuus*

